# Fámíningar spenna seg út

**Fámjins Komuna hevur arbeiði fyri umleið hálvaaðru millión í gongd í løtuni. Nýggjur vatnbrunnur og kloakkskipan um alla bygdina skulu gerast**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Fámjin:** Í Fámjin eru útlit fyri nýggjum vatnbrunni, eins og kloakkskipan verður løgd um alla bygdina.

Vatnbrunnurin er komin til Fámjins, og bíðar bara eftir at verða settur upp, sigur Elin Nielsen, borgarstjóri.

Talan er um ein glastrevjabrunn, sum verður settur upp niðan fyri Kirkjuvatn, har verandi brunnur er. Verandi brunnurin er ikki tíðarhóskandi og eisini ov lítil til tørvin, sum er. Nýggi brunnurin fer at nøkta tørvin væl fram í tíðina, sigur borgarstjórin.

Elin Nielsen sigur, at nýggi vatnbrunnurin, sum gjørdur verður saman við einum lítlum parti av nýggjari leiðing, fer at kosta umleið 300.000,- krónur.

Nýggj kloakkleiðing skal leggjast um alla bygdina í Fámjin, og farið er undir fyrsta part av hesi verkætlan, greiðir borgarstjórin frá.

Talan er um at leggja uppsamlingarrør kring alla víkina, har frárenslið frá bygdini skal savnast í og leiðast til havs. Hesin parturur av arbeiðinum verður gjørdur í ár og fer at kosta meira enn eina millión krónur, sigur Elin Nielsn borgarstjóri.

Síðan veðru farið undir at leggja leiðingar til frárenslini, sum síðan verður bundið í tann partin, sum gjørdur er. Hetta fer at taka longri tíð, og skal fíggjast yvir fleiri fíggjarár.

– Tað verður gjørt á tann hátt. greiðir borgarstjórin frá, at vit taka ein býling í senn og gera so heilt liðugt har. Væntandi fer tað at taka eini fýra ár ella so, til øll kloakkskipanin í Fámjin er liðug.

Hetta er stórarbeiði, og tað hevur verið trupult at fingið fólk at gjørt arbeiðið, sigur borgarstjórin. Nú er tað so eydnast, og tí verður tann stóra uppsamlingskloakkin gjørd beinanveg.

Ananrs er vegagerð á skránni hjá kommununi. Teir kommunalu vegirnir eru í vánaligum standi, og skulu umvælast, eins og nakað av nýgerð eisini skal gerast.

Tvey nýggj hús eru í gerð í Fámjin í løtuni. Tað er fólk við tilknýti til bygdina, sum byggja, sigur Elin Nielsen. Fremmand fólk hava ikki biðið um grundstykki í bygdini, sigur hon og leggur afturat, at kommunan heldur ikki hevur nakra útstykking klára. Tað, sum bygt verður, er á privatum grundstykkjum.

Nýggja fólkaskúlalógin gav mongum kommunum høvuðbrýgggj, tí so nógv var at gera við skúlarnar. Men í Famjin eru tey væl fyri í so máta, sigur borgarstjórin. Skúlin lýkur øll tey krøv, sett verða, so tað kann ikki vera betri.

Nú skúlaárið byrjar aftur mánadagin, fara fimm børn í skúla fyri fyrstu ferð í Fámjin. Tað er nógv, heldur borgarstjórin, sum sigur, at í bygdini eru trý børn undir skúlaaldur.

Tað er ikki nógv arbeiði at fáa í Fámjin. Eitt sindur av kommunalum, og so smoltstøðin Guttansstøð, har fýra mans arbeiða.

Útróður er heldur ikki nakar av týdningi, tí kyrruvont er. Tó verða smærri bátar tíðum flotaðir, tá líkindi eru til tess.



Farið er undir at gera kloakkskipanina í Fámjin. Í ár verður arbeitt fyri eina góða millión, og arbeiðið fer tilsaman at taka ein fýra ár, sigur borgarstjórin

Mynd: Edvard Joensen



Nakað verður róð út við smáum bátum úr Fámjin

Mynd: Edvard Joensen

# Kappróðurin skal mennast aftur

**Úrslitini hjá kappróðrinum á Tvøroyri hava ikki verið nóg góð seinastu árini. Men tað ætlar nevndin í Froðbiar Sóknar Kappróðrarfelag nú at gera nakað við**

KAPPRÓÐUR
*Edvard Joensen*

**Tvøroyri:** Froðbiar Sóknar Róðrarfelag fer at royna at menna kappróðurin á Tvøroyri til at líkjast tí, hann einaferð var. Seinastu tíðina hevur virksemið verið í minna lagi, men tað skal nú broytast, sigur Kristian Stórhamar, nevndarlimur í Froðbiar Sóknar Róðrarfelag.

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag eigur í dag tríggjar bátar. Teir eru fýramannafarið Firvaldur og tvey tíggjumannafør, sum bæði eita Suðringur. Nýggi og gamli. Men felagið hevur biðið um eitt nýtt fýramannafar, og í tí sambandi verður nú roynt at fáa pening til vega. Roknað verður við, at nýggi báturin verður latin felagnum um ársskiftið, sigur Kristian Stórhamar.

Men kappróður í dag er ikki, sum hann hevur verið. Einki við, at tað er nokk at sita í bátinum nakrar mánaðar um summarið. Nei, í dag verður vant alt árið, og tí er neyðugt við sonevndum rógvimaskinum, sum settar verða upp innandura. Eisini onkrum slíkum ætlar Froðbiar Sóknar Róðrarfelag at fáa hendur á.

Tað hevur verið rættiliga smáligt við kappróðrinum á Tvøroyri seinnu árini. Men nú hevur nýggja nevndin í felagnum sett sær fyri, at tað skal broytast. So illa hevur staðið til í siðvanda felagnum, at okkurrt ár hevur ikki verið flotað, og eingin manning hevur luttikið í kappróðri.

Í ár hevur kortini verið hampiligt í so máta, hóast úrslitini ikki hava verið nakað serlig, sigur Kristian Stórhamar. Fýra manningar hava róð í ár.

Firvaldur hevur verið mannaður við gentum, eins og felagið eisini hevur lænt Brodd úr Sumba, sum hevur róð við gentumanning av Tvøroyri. Umframt hava tvørafólk mannað seksmannafarið Snoprikk úr Hvalba við bæði kvinnum og monnum.

Talan er um ungt fólk, sum tey í felagnum seta vónir til. So hóast fyrsta árið ikki gjørdist nakað vinnaraár soleiðis, vænta tey, at hesi ungu fólkini fara at halda fram og koma seg, sum frálíður.

Verri hevur gingið at fáa mannað tíggjumannafarið, men nevndin hevur sett sær sum mál, at komandi ár skal Suðringur aftur síggjast á stevnunum kring landið.

Á bátastevnuni, sum hildin varð á Tvøroyri seinasta vikuskifti, var eisini ein framsýning við modelbátum og -skipum, sum Kappróðrarfelagið skipaði fyri. Hetta var liður í arbeiðinum at savna inn pening til rakstur felagsins. Nøkur og 30 model, sum fólk í Suðuroy eiga, vóru at síggja á framsýningini, umframt onnur ting, sum høvdu við sjógvin at gera. Eitt nú vóru eini tvey gomul vaðbein at síggja, eins og ein grønlendsk kajakk umframteftirgerðir av grindareiðskapi. Eini 300 fólk vitjaðu framsýningina.



Gamli Suðringur luttøók í kappróðrinum á batastevnuni á Tvøroyri seinasta vikuskiftið

Mynd: Edvard Jooensen



Trolbáturin Tindur:

# Fríkendur fyri ólógiligan fiskiskap

**Trolbáturin Tindur, sum 4. august varð tikin fyri at fiska á stongdum økið, var mikudagin fríkendur fyri ólógligan fiskiskap. Hetta kemst av, at økið, sum Tindur var á, var í veruleikanum ikki stongt, men lá í einum øki, sum var opið**

FISKIVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Fiskiveiðueftirlitið staðfesti mikudagin, at trolbáturin Tindur, sum 4. august varð tikin fyri at fiska á stongdum øki, ikki fiskaði á stongdum øki, tá tað kom til stykkið.

Tindur var tikin í økinum vestanfyri Suðuroynna, sum eitur D2, men D2 liggur í einum øðrum øki, sum eitur D1, og í D1 er loyvi at fiska til 31. august. Tískil hevði trolbáturin ikki forbrotið seg.

Annars kravdi fútin, at hald varð lagt á veiðuna og reiðskapin hjá trolbátinum, umframt alla veiðuna. Harafturat skuldi skiparin gjalda 60.000 krónur í bót. Tilsamans var talan um smáar 270.000 krónur.

Skiparin segði seg góðtaka bótina og at hald varð lagt á reiðskapin, men hann góðtók ikki, at hald varð lagt á alla veiðuna. Hann helt, at hald kundi bert leggjast á veiðuna, sum varð fiskað í D1, og sum hevði eitt virði upp á einar 1.800 krónur.

Men tá Fiskiveiðueftirlitið mikudagin fann útav, at Tindur als ikki hevði fiskað á stongdum øki, varð málið slept.

Finn Ougaard, varafúti sigur við útvarpið, at av tí, at Tindur ikki hevur gjørt nakað ólógligt, so er onki mál longur. Tí skal trolbáturin ikki gjalda nakra bót, og hald verður ikki lagt á reiðskapin og ei heldur fiskin.

Elmar Højgaard á fiskiveiðueftirlitinum sigur, at kunngerðin er óheppið orðað, og at D2 liggur í einum øki, sum upprunaliga átti at verið stongt. Aðrar kunngerðir eru eisini orðaðar á henda hátt, og tær skulu broytast í framtíðini.



*Trolbáturin Tindur, sum varð tikin fyri at fiska á stongdum øki tann 4. august, er nú fríkendur fyri ólógligan fiskiskap. Tað vísti seg, at fiskiveiðueftirlitið hevði mistikið seg, og at báturin als ikki hevði fiskað í stongdum øki*

# Flakavirki er bert ein millumstøð



**Rektarin á studentaskúlanum á Kambsdali, Sámal í Skorini, nevndi fyri stuttum, at tey ungu heldur vilja arbeiða enn at koma í skúla. Og serliga nú tá tíðirnar eru góðar, velja tey at arbeiða ístaðin fyri at setast aftur á skúlabonk. Men hetta er ikki nakað flakavirkini merkja nakað til – kanska heldur øvugt**

ARBEIÐSLÍV
*Ingrid Bjarnastein*

– Á flakavirki kemur ongin uttan hann onki annað fær, sigur ein av virkisleiðarunum í Eysturoynni.

– Tað vísir seg at vera ógvuliga ringt at fáa fólk at arbeiða. Nøkur fá eru, sum koma, men tað er ongin, sum kemur fyri at vera. Flakavirkið er ikki meira enn ein millumstøð.

Virkisleiðarin, sum ikki vildi nevnast við navni, sigur, at fólk tráðar ikki eftir at sleppa á flakavirki. Tey flestu rýma aftur.

– Nøkur eru, sum koma at arbeiða í eitt ár, ella til tey finna eitt annað arbeiði. Tað er ofta nógv betri at sita á einum kontóri við turrum fótum enn at standa á einum køldum virki.

Hann vísir á, at um flakavirkini í framtíðini skulu fáa fólk at støðast, so mugu tey duga at gera arbeiðið áhugaverdari.

– Sjálvandi er onkur, sum heldur vil arbeiða fisk – tíbetur eru vit ikki øll líka, men vit síggja ikki at nakar fer úr øðrum arbeiði fyri at koma á flakavirki. Heldur øvugt, sigur virkisleiðarin at enda.

# Bilaavgjøldini verða ikki lækkað



**Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sigur, at bilaavgjøldini verða ikki lækkað, tá ES reglan um, at allir bilar skulu seljast fyri sama prís til øll lond, kemur í gildi**

BILASØLA
*Ingrid Bjarnastein*

– Nei, vit hava ikki hugsað um, at lækka avgjaldið á bilum, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.

Fíggjarmálaráðharrin vísir á, at í sambandi við sama spurning fyri nøkrum mánaðum síðani, so søgdu tær bilasølurnar fíggjarmálastýrið hevði samband við, at ongin stór hækking verður nú í oktober.

– Hækkingin í Føroyum er longu hend, tí bilasølurnar eru langt síðani byrjaðar at hækka, sigur Karsten Hansen.

– Vit hava tí ongar ítøkiligar ætlanir um at lækka avgjaldið á bilum. Prísurin á ymsum vørum hækkar kring heimin, og tá kann tað ikki vera meiningin, at Landskassin skal gjalda allar meirinntøkurnar. So vera skjótt øll avgjøld og allur tollur burtur.

Tó sigur fíggjarmálaráðharrin, at samlaði avgjaldstrupulleikin fer at verða tikin upp um ikki so langa tíð.

– Har verður atlit tikið til umhvørvið og trygd, meðan ongin munur verður gjørdur á um bilurin er Toyota ella okkurt annað bilmerki.